# Kvinnulandsliðið breiðkar

B36 hevur nú eins nógvar spælarar á kvinnulandsliðnum sum KÍ, ið annars hevur verið mest sum einaráðandi hesum viðvíkjandi

Landsliðsvenjarin, Álvur Hansen, hevur nú boðað frá, hvørjar spælarar hann fer at hava við sær til landsdystin móti Irlandi komandi vikuskifti.

Spælararnir, sum eru úttiknar til ferðina, eru hesar: sta Magnusssen AB, Laila Jespersen, Rannvá Augustinussen, Unn Kragesten, Ása Dam á Neystabø, Elsebeth Jónsson, Halltóra Joensen B36, Rakul Magnussen, EB/-Streymur, Mary-Ann Isaksen, Jacoba Langgaard, Anna Malena Højgaard GÍ, Ann Olsen, Malena Josephsen, Rannvá B. Andreasen, Annelisa Justesen, Randi S. Wardum, Bára S. Klakstein, KÍ, Jónapetra Mikkelsen FSV-04.

Leiðarar á ferðini verða Álvur Hansen, venjari, Jón Harald Poulsen, hjálparvenjari, Jóngerð Biskopstøð, fysioterapeutur.

-jm

# Oyggjaleikirnir órógva ikki



*Úr Klaksvík verður sagt, at kappróðurin í ár helst verður skjótari avgreiddur, enn hann hevur verið seinnu árini*

**Áhugin fyri at taka lut á Norðoyastevnu er eins stórur, sum hann var í fjør, og tað bendir á, at leikirnir í Hetlandi ikki fara at órógva kappróðurin**

KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*

56 manningar fara at taka lut í fyrsta FM kappróðrinum, sum verður í Klaksvík í morgin. Hetta er ein manning fleiri enn í fjør, tá ið 55 manningar luttóku í kappróðrinum í Klaksvík.

Tað er merkisvert, at luttøkan kvinkar rætta vegin. Ofta plagar at verða tikið til, at tað sæst aftur í minni luttøku í FM kappingini í kappróðri, at Oyggjaleikir eru á skránni. Eingir leikir vóru í fjør. Um ein mánað vera leikirnir í Hetlandi, og áhugin fyri at taka lut í kappróðrinum á Norðoyastevnu bendir ikki á, at leikirnir í Hetlandi fara at draga kapprógvarar til sín.

## Upp og niður

Nógvu tey seinastu árini hevur verið kappast í seks FM bólkum. Í ár eru sjey bólkar. Broytingin er tann, at tað nú verður kappast í tveimum bólkum, har tað áður varð kappast í 5-mannaførum við gentum. Nú eita bólkarnir 5-mannafør gentur og 5-mannafør kvinnur. Á Norðoyastevnu í fjør luttóku 14 manningar í kappingini millum 5-mannafør við gentum. Nú fara fimm manningar at kappast í tí aldursbólkinum, sum eitur 5-mannafør við gentum, og ellivu manningar fara at luttaka í tí kappingini, sum eitur 5-mannafør við kvinnum.

Størsti vøksturin er í kappingini millum 6-mannafør við monnum og 8-mannafør. Í fjør kappaðust fimm 8-mannafør á Norðoyastevnu. Hesa ferð verða tey sjey í tali. Í fjør kappaðust tíggju 6-mannafør við monnum. Hesa ferð fara tólv 6-mannafør við monnum at kappast í Klaksvík. Harvið verður hetta størsti róðurin av øllum. Tað er nevyan komið fyri áður, at 6-mannaførini við monnum hava verið størsti bólkurin.

Í fjør luttóku seks 10-mannafør á Norðoyastevnu. Í ár fara eisini seks 10-mannafør at luttaka.

Mest órógvandi er, at áhugin millum dreingir at rógva kapp, tykist at vera minkandi. Í fjør luttóku trettan dreingjamanningar á Norðoyastevnu. Í ár hava níggju dreingjamanningar boðað frá luttøku.

Umframt FM kappingarnar verður barnaróður, har luttøkan er vaksandi. Átta manningar hava boðað frá luttøku í barnaróðrinum fyri gentur og átta manningar hava boðað frá luttøku í barnaróðrinum fyri dreingir. Í kappingini millum 5-mannafør við old girls og kapping millum 10-mannafør við oldboys manningum er fráboðanarfreistin í kvøld.

## Upp á slagið

Undanfarnu árini hevur ofta verið uppi og vent, hvussu harmuligt tað hevur verið, at samlaða tíðin, sum er farin til kappróðurin, hevur verið so long. Ikki minst hevur á hesum síðunum verið víst á, at tað nú á døgum ongastaðni hoyrir heima, at tað ikki fyrrenn ásettu róðrartíðina verður farið at leggja fyrstu bátarnar.

Fyrireikararnir í Klaksvík ætla ikki at hava hetta sitandi á sær. Teir siga, at í fyrstu kappingini, sum verður millum old girls, verður startskotið klokkan 14.00. Teir siga eisini, at í fyrstu FM kappingini, sum verður millum 5-mannafør við dreingjum, er ætlanin at lata startskotið av klokkan 15.00. So tað ræður um hjá dreingjamanningunum og øllum hinum at vera úti á málinum í góðari tíð.

Tað verður róð í hesi røð: old girls (klokkan 14.00), 5-mannafør dreingir (klokkan 15.00), 6-mannafør kvinnur, 5-mannafør gentur, 10-mannafør old boys, 5-mannafør kvinnur, 6-mannafør menn, 5-mannafør dreingir barnaróður, 8-mannafør, 5-mannafør gentur barnaróður og 10-mannafør.

# Nýggir garpar skulu umboða føðilandið

**Sjey feløg eiga spælarar á yngsta landsliðnum, sum mitt í næsta mánað skal luttaka á altjóða kapping í Aberdeen**

U 15 LANDSLIÐIÐ
*Jóannes Hansen*

Hvørjir ungir dreingir kring landið hava serliga góð evnir at spæla fótbólt. Serliga millum dreingirnar sjálvar, men eisini í feløgunum kring landið, er áhugin fyri hesum ivaleyst stórur.

Nú hava U 15 landsliðsvenjararnir, Mathias Davidsen og Eli Hentze givið sítt boð uppá, hvørjir teir halda vera teir stinnastu. Tað hava teir gjørt, nú teir hava úttikið U 15 landsliðið, sum skal luttaka í Aberdeen International Football Festival. Hann verður í døgunum 16. til 23. juli.

Best umboðaðu feløgini á liðnum eru NSÍ, HB, B36 og KÍ, og í alt eiga sjey feløg spælarar millum teir átjan, sum eru úttiknir, og sum í vikuskiftinum skulu á venjingarlegu á Svangaskarði, har teir skulu møta leygarkvøld klokkan 19.30 ella tá ið landsdysturin ímóti Sveis verður liðugur.

Úttiknu spælararnir eru hesir: Heini Vatnsdal og Adrian Cieslewicz, VB, Gilli Sørensen, TB, Kristin R Mouritsen, Gunnar Thomsen og Tummas Juul Thomsen, HB, Róaldur Jacobsen, Trygvi Danielsen og Ámund Hansen, B36, Jóan Símun Edmundarson, Remi Langaard, Viljormur Davidsen, Karl Løkin og Monrad H. Jacobsen, NSÍ, Hans Jørgensen, Andrias Ellingsgaard og Daniel H. Dam, KÍ og Kaj Leo í Bartalstovu, GÍ.